# M. A. Jacobsens virðislønir verða handaðar hósdagin

**Hósdagin í næstu viku klokkan 17 handar Tórshavnar kommuna Mentanarvirðislønir M. A. Jacobsens og Barnabókaheiðurslønir Tórshavnar býráðs í Müllers Pakkhúsi**

VIRÐISLØNIR

1958 var fyrsta árið, virðislønin varð latin, og heitið tá var Bókmentavirðisløn M .A. Jacobsens. Ein ella tvær virðislønir kundu verða latnar. Í 1972 varð Reglugerðin fyri Bókmentavirðisløn M. A. Jacobsens broytt, soleiðis at onnur virðislønin skuldi vera fyri fagurbókmentir og onnur fyri yrkisbókmentir.

Í 1985 varð reglugerðin aftur broytt. Nú bar til at lata tríggjar virðislønir fyri ávíkavist fagurbókmentir, yrkisbókmentir og mentanaravrik. Nevndin fekk heimild til okkurt árið ikki at lata onkra av virðislønunum.

Tórshavnar kommuna samtykti smávegis broytingar í 1996, m. a. er heitið nú Reglugerð fyri Mentanarvirðislønir M. A. Jacobsens.

Í nevndini fyri Mentanarvirðislønir M. A. Jacobsens eru fimm limir. Teir verða valdir fjórða hvørt ár, tá ið nýtt býráð er valt og skipað. Kommunan velur tríggjar limir, Fróðskaparsetrið ein og Rithøvundafelagið ein.

Í januar 2005 var ein nýggj nevnd sett. Tórshavnar kommuna valdi nýggjan lim, Rigmor Dam fyri Egon Hansen, Erling Isholm og Jákup Jacobsen eru afturvaldir.

Fyri Fróðskaparsetrið er Turið Sigurðardóttir afturvald, og fyri Rithøvundafelagið er Gunnar Hoydal afturvaldur.

Eingin formaður er í nevndini. Fastur skrivari er býarbókavørðurin, Anna Brimnes.

Barnabókaheiðursløn Tórshavnar býráðs varð fyrstu ferð latin í 1976. Í nevndini fyri henni eru fimm limir. Nevndin verður vald av nýggjum eftir hvørt býráðsval.

Fastur limur er barnabókavørðurin á Býarbókasavninum í Tórshavn, Malan Hilmarsdóttir, skrivari, ein limur valdur fyri skúlabókavørðarnar í Tórshavnar kommunu, Hansina Huusgaard, tveir limir, valdir av Tórshavnar kommunu, Poulina Slættanes og Ann Elisabeth Joensen.

Formaðurin í mentamálanevnd Tórshavnar kommunu er fastur formaður í nevndini. Í hesum skeiðnum er tað Hildur Eyðunsdóttir.

Tvær virðislønir kunnu latast, men nevndin hevur eisini heimild til bert at lata eina ella onga, í ár verða tvær latnar.

# Hvat er søga?

Leygarkvøldið 24. september kl.19 verður skipað fyri fyrilestri í Áarstovu við P.h.D. stud. Solfinn Hansen, um spurningin hvat er søga og hvat er skaldskapur?

Fram til síðsta fjórðing av 19. øld var heilt vanligt at nýta frásagnir og skaldskap sum søguligar keldur. Søgur, bornar av manna munni, stóðu sterkt í fólksins tilvitan sum bæði veruligar og nærverandi, eisini hóast tær vóru eyðsýniliga merktar av skaldskaparligari nýgerð, yvirnáttúrligum hendingum og tílíkum. Við naturalismuni kom ein hugur at síggja søguna sum eina samfelagsvísind, har tað, ið kundi mátast og vigast, fekk framíhjárætt. Frásagnir, bæði av manna munni og á skrift, mistu sítt søguliga virði vegna teirra eyðsýnda subjektivitet, og nart hetta rák eisini við Føroyar, og hóast tað ongantíð veruliga fekk fastatøkur, setir fatanin framvegis dám á allýsingarnar av, hvat er søga og hvat er skaldskapur.

Í fyrilestrinum er ætlanin at greiða frá hesum spurningi við dømi úr føroyskum skaldskapi, bæði munnbornum og skriftfestum, og metast skal um, í hvønn mun hesin partur av naturalistiska sjónarmiðnum ger seg galdandi.

**nud**

# Lena í donskum útvarpi



Á teimum báðum stóru útvarpsstøðunum hjá Danmark Radio er Step on the gas við Lenu komin á playlistan. Stóru útvarpsstøðirnar hava ein sokallaðan "Playlist", hetta eru tey løgini, sum støðin sendir.

17. oktober kema nýggja útgávan av "Can't erase it" út á danska marknaðin, og "Step on the gas" er stakfløgan, ið leggur upp til fløguútávuna. Lena spælir eisini hópin av konsertum í Danmark í løtuni.

28. september í Musikhuset í Klejtrup.kl. 19.30 - Lena Andersen, Maria Guttesen og Amalie Riis

30. september og 1. oktober í Deli Deluxe í Brunsgade í Århus -vLena Andersen, Maria Guttesen og Amalie Riis

14. oktober Studenterhuset i Århus - Lena Andersen, Maria Guttesen, Amalie Riis, Bendedikte Riis og Annika Aakjær

18. oktober kl. 21.00 Krudttønden í Keypmannahavn útgávukonsert við Lenu

**nud**

# Stovna bátafelag í Gøtu

BÁTAFELAG

Yvir 30 bátaeigarar í Gøtu høvdu mikukvøldið leitað sær á fund í Glyvra Hanusar húsum at taka stig til stovnan av einum bátafelag. Ein 3-manna nevnd - Tummas Thomsen, Janus Joensen og Atli Hansen - var vald at fyrireika og kalla inn til stovnandi aðalfund sum skjótast.

Í løtuni eru umleið 50 bátar í bátahylinum í Gøtu. Av tí at bátarnir, sum eru komnir afturat í seinastuni, eru alsamt størri gerst eisini meira trongligt í hylinum. Eitt endamál við at seta eitt bátafelag á stovn er at samarbeiða við Gøtu Kommunu um at loysa henda trupuleika.

Samstundis er eisini farið undir at smíða eitt »undirhús«. Gøtu Kommuna hevur latið ein part av gama Kajhúsinum til endamálið saman við nakað av tilfari. Ætlanin er so, at tað skal setast í stand av limunum. Martin Juul Jarnskor stendur fyri hesum tiltakinum.


**Hi-Fi**

damor

**THOMSON 20" SJÓNVARP**




1 scartstikk, AV-front, TekstVarp, fjarstýring

**LG DVD og VIDEO v/ DIVX**




**DVD:** Spælir DVD, CD, MP3, Divx og er kodufríður
**Video:** 6 Høvd stereo, Long Play
Vanligur prísur: 1.798,-

**HARMAN/KARDON & JBL HEIMABIO**




**DVD 22:** spælir DVD, CD og MP3, Progressive Scan og component út.
**AVR130:** 45wx5W 8 ohm RMS, 25+/-Amp, innbygt Radio
**JBL SCS260.5:** 2 vegis hátalarar 40Wx5 RMS v/upphang, Subwoofer 100W RMS
Vanligur prísur: 13.294,-

Á HJALLA · 188 HOYVÍK
TEL 315415 · FAX 319001
damor